## DAGSINS MEINING

### Fleirfalt tillukku til HB



HB fólk, núverandi sum fyrrverandi spælarar, stuðlar og viðhaldsfólk, hava nakað at gleðast um í hesum døgum, í hesum árinum. Eitt er stóri rundi 100 ára føðingardagurin. Eitt annað er meistaraheitið, sum varð vunnið í Gundadali sunnudagin. So ein kann loyva sær at ynskja hesum fræga ítróttarfelag ikki bert tillukku men fleirfalt tilukku.

At vinna FM-heitið tríggjar ferðir á rað er eisini eitt roysnisbragd. Og so at vinna tað í føðingardagsárinum og entá langt áðrenn kappingin er lokin, er ikki minni bragd. Tað lýsir av vilja, treiskni og dugnasemi.

Og ikki nokk við tí. Enn ein sigur hjá HB er kappingin um at hava vunnið flest meistaraheiti gjøgnum tíðina. Á sjálvari málstrikuni, á 100 ára degnum hjá HB og KÍ megnaði havnaliðið at yvirhála norðingar. HB kann breggja sær av at hava vunnið 18 meistaraheiti í bestu deildini í síni livitíð, tilsamans 18 ímóti teimum 17 hjá KÍ.

Taka vit samanum, so hava vit nógv at ynskja HB tillukku við.

Hvat føðingardagsgávuni viðvíkur á 100 ára degnum, so hevur eitt vælspælandi og viljasterkt HB-lið sjálvt latið felag sínum ta bestu gávuna, nevniliga FM-heitið. Tað kann eingin gera betur.



Eisini vit á Sosialinum ynskja HB hjartaliga tillukku við 100 ára føðingardegnum og FM-heitinum og øllum hinum heitunum.

**Sosialurin**

# Stór ráðstevna um trivnað hjá børnum

**Fríggjadagin og leygardagin hittast 400 fólk, sum starvast við børnum, í Norðurlandahúsinum. Tey skulu tosa um trivnað hjá børnum**

RÁÐSTEVNA
*Tíðindaskriv*

Talan er um starvsfólk á dagstovunum, heilsusystrar, sosialráðgevarar, kommunal- og landspolitikkarar, barnaverndir og onnur, sum hava áhugað fyri evninum.

Umframt føroyskar fyrilestrarhaldarar, so eru stór nøvn á danska barnagarðsøkinum heintaði heim til ráðstevnuna. Kend fólk sum Margrete Brun og Erik Sigsgaard fara at siga frá teirra arbeiði og teirra royndum.

Margrethe Brun Hansen, sum er útbúgvin námsfrøðingur og sálarfrøðingur, fer at tosa um bók hennara: "De kompetente forældre." "Sig mær hvussu foreldur tykkara eru, og eg kann siga tykkum, hvussu tit eru." skrivar høvundurin í formælinum. Nógv børn hava tørv á foreldrunum, ið vilja og tora at vera viðleikarar í teirra gerandisdegi. Hon fer at viðgera spurningin um stovnurin skilir tað nýggja ættarliðið av foreldrum.

Erik Sigsgaard, sum er ein kendur fyrilestrahaldari, og sum hevur gjørt nógvar kanningar av børnum, hevur skrivað bókina: "Skæld ud." Hjálpir at skelda og hvørji árin hevur hetta á børnini.

Størsta takið á barnagarðsøkinum í Føroyum seinastu mongu árini hevur verið at nøkta tørvin á barnagarðs og vøggustovuplássum. Nú hetta mál er við at vera rokkið, er tíðin komin at venda prátinum inn á, hvat ein góður stovnur er fyri nakað. Hvørji krøv verða sett fakliga til barnaansingina? Hetta fer Erik Sigsgaard at geva eitt boð upp á í sínum fyrilestri.

Eisini fara føroysku Minna Poulsen og Jóngerð Poulsen, heilsufrøðingar at siga sína hugsan um foreldraførleika. Marjun Nielsen, sálarfrøðingur, fer at umrøða evnið: "Sálarliga umhvørvið á dagstovnum." Tonja Ziskasson, sosialráðgevi, og Jórun Niclasen, sernámsfrøðingur, fara at røða um fráboðanarskyldu /tagnararskyldu í dagliga samstarvinum við foreldur og aðrar samstarvsfelagar.

Ráðstevnan byrjar klokkan 08:30 báðar dagar, og ráðstevnan er fullteknað. Bjørt Samuelsen, tíðindakvinna, heldur skil á.

# M. A. Jacobsens virðislønir handaðar hósdagin

VIRÐISLØN

Hósdagin 16. september klokkan 17 handar Tórshavnar kommuna Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens í Sjónleikarhúsinum.

Í 1958 var fyrsta árið, at virðislønin var latin, og heitið tá var Bókmentavirðisløn M. A. Jacobsens. Í 1996 samtykti Tórhavnar kommuna eina nýggja reglugerð og broytti tá heitið til Mentanarvirðislønir M.A. Jacobsens. Sambært nýggju reglugerðini kann nevndin lata tríggjar virðislønir, fyri ávikavist fagurbókmentir, yrkisbókmentir og mentanaravrik. Nevndin hevur eisini heimild til okkurt árið ikki at lata onkra av virðislønunum.

Í nevndini fyri Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens eru fimm limir. Teir verða valdir fjórða hvørt ár, tá nýtt býráð er valt og skipað. Kommunan velur tríggjar limir, og í hesum skeiðnum eru teir: Egon Hansen, Erling Isholm og Jákup Jacobsen. Fróðskaparsetrið velur ein lim, sum í løtuni er Turið Sigurðardóttir, og Rithøvundafelagið ein, Gunnar Hoydal. Eingin formaður er í nevndini. Fastur skrivari er býarbókavørðurin, Anna Brimnes.

Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs varð fyrstu ferð latin í 1976. Í nevndini fyri hana eru fimm limir. Fastur limur er barnabókavørðurin á Býarbókasavninum í Tórshavn, Malan Hilmarsdóttir, sum eisini er skrivari, ein limur valdur av Felagslærararáðnum við kommunalu skúlarnar í Tórshavn, Hervør Jákupsson, tveir limir, valdir av Tórshavnar kommunu, Poulina Slættanes og Arnbjørn Dalsgarð. Formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar kommunu er fastur formaður í nevndini. I hesum skeiðnum er tað Heðin Mortensen.

Tvær virðislønir kunnu latast, men nevndin hevur eisini heimild til bert at lata eina ella onga, og í ár verður eingin latin.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Býtið enskt og danskt um í skúlanum

KRONIKK
*Óli Samró*
*Den Haag*
*10. september 2004*



*Óli Samró*

Í síðstu viku ferðaðist eg úr Hollandi til Íslands og endaði í Hirtshals til norðurlendska ráðstevnu um fiskivinnuskipanir. Alt samskiftið á hesi strævnu ferð í Norðurlondum var á enskum!

Hetta er ein persónlig kronikk í tveimum pørtum, skrivað umborð á flúgvarum og vøkunætur á hotellum.

Við grundarlagi í mær sjálvum og børnum okkara, vil eg viðgera málsligu fortreytirnar, vit føroyingar hava fyri at taka lut í altjóða og norðurlendskum samstarvi. Í seinni grein vil eg gera viðmerkingar, til hví, eg meti vit eru so dyggiliga hektaði av menningini á altjóða leikpallinum.

Skulu vit hava møguleika at fylgja við, er neyðugt, at fjøldin er stinn í enskum. Danskt kann ikki brúkast. Mítt uppskot er at býta enskt og danskt um í skúlanum, so danskt verður triðja mál og enskt næsta mál.

Hetta er ikki ein kritikkur av føroyska skúlanum ella føroysku lærarunum, ið vit sum heild einans hava gott at bera.

Eg vóni at henda kronikk kann elva til kjak millum lærarar og millum tey, sum eru framsøgufólk í politisku flokkunum. Enskt í skúlanum er eitt álvarsmál. Føroysk foreldur kunnu ikki í dag bjóða sínum børnum so vánaliga frálæru í enskum!

### Millum iranar, polakkar og indarar.

Síðsta summar byrjaðu okkara børn á »International School of the Hague«, Hanus tá 15 ár, Tummas tá 12 ár og Súsanna tá 9 ár. Trý vanlig føroysk børn, sum øll kláraðu seg væl í skúlanum.

Áðrenn skúlin byrjaði, høvdu tey verið til upptøkuroynd, og vóru øll trý endað ein klassa undir javnaldarnar. Við øðrum orðum vóru tey sum heild eldst í sínum flokki, og var tað væntað, tá børnini byrja um 4 ára aldur í »International School«.

Tá skúlaárið byrjaði, blivu flokkarnir býttir eftir, hvussu stinn tey vóru í enskum. Harafturat var ein minni bólkur við serundirvísing til tey, sum ikki kláraðu at fylgja við. Í hesum bólkinum endaðu okkara børn millum børn frá t. d. Kuba, Egyptalandi, Pólandi og frá Iran. Hanus tó so vánaligur, at skúlin ikki metti hann føran at læra annað týðandi mál, t. v. s at hann ikki kundi ikki fáa frálæru í fronskum, týskum ella sponskum.

Børnini úr nærum øllum hinum londunum høvdu havt enskt í skúlanum í minst trý ár meira enn okkara børn!

Vit vistu, at øll undirvísingin og lærutilfarið er á enskum. Hetta hildu vit ikki fór at vera nakar trupulleiki - men vit tóku feil. Eg tori beskeðin at siga, at í føroyska skúlanum mundu okkara børn teljast millum tey stinnastu í enskum í teirra árgangi! Tey hava havt allan møguleika fyri at duga enskt. Tey hava ferðast, lisið, spælt telduspøl o. s. fr. á enskum, síðan tey vóru smá.

### Eg eri hvørja ferð vánaligast

Ringasta eg veit er at tapa og vera vánaligast. Men satt at siga havi eg ikki tikið lut í nøkrum altjóða kjakpaneli, hildið fyrilestur o. t. uttan at vera tann vánaligasti til at nýta enskt. Eg dugi ikki nóg væl at vera beinrakin, eg má steðga á við: »What is it called in english«. Eingin uggi er í, at tað sama er galdandi fyri nærum allar hinar føroyingarnar, eg havi hoyrt tikið lut í altjóða kjaki. Sum heild eru íslendingar, norðmenn, danskarar, svenskarar, hollendingar, týskarar o. s. fr. ein klassa framman fyri okkum føroyingar í enskum.

### Fyritreytirnar hjá mær og børnunum

Lat meg beinanveg gera greitt, at mál ikki er mín sterkasta síða!

Mítt enska byrjaði í 6. flokki í Hoyvíkar skúla. Í real hevði eg enskt hjá frálíkari lærarinnu á Eysturskúlanum. Mín enska undirvísing tók ein bráðan enda longu aftaná 1. G á matematisku deild í Hoydølum. Hetta var enski førningurin, eg hevði við mær frá føroyska skúlaverkinum, tá húgvan var komin á høvdið í 1982.

Tá eg stovnaði mítt egna virki í 1991 var fyrsta íløgan hjá mær ein máni intensivt málskeið í enskum niðri í Torquay í Suðuronglandi - helst lutfalsliga størsta men skilabesta íløgan eg havi gjørt. Ein summarferia og kr. 45.000 er nógv við nýggjum húsum, nýútbúgvin við lestrarskuld og við tá tveimum smádreingjum - 0 og 3 ár.

Tað syrgiliga er, at umstøðurnar hjá mínum børnum at læra enskt í føroyska skúlanum eru lítið og einki batnaðar.

### Føroyar hava valt enskt til triðja mál!

Við at halda fast um danskt sum næsta mál hava Føroyar aktivt valt enskt til triðja mál. Sjálvur hevði eg danskt í 10 ár frá triðja flokki til 3. G. Alt frá at læra danskt frá botni til tulkingar av skaldskapi.

Hjá mær eins og børnunum er danskt lært sum fyrsta fremmanda mál!

### Ísland heystar nú fyrimunirnar av at hava valt enskt

Í Íslandi er eingin ivi um, at enskt er teirra næsta mál. Kanska er tað høvuðsfrágreiðingin fyri, at íslendski búskapurin og íslendska vinnulívið seinastu fimm árini er lopin avstað í risafetum.

Íslendingar sum heild duga eins væl enskt sum vit danskt. Hinvegin duga teir ungu íslendingarnir sum heild illa ella als ikki danskt. Íslendsku vinnulívsfólkini, eg kenni, hava altjóða útbúgvingar allastaðni frá í verðini - Boston, Florida, London, Tromsø, Keypmannahavn o.s.fr.

Fyri íslendingar er samskifti við útheimin eingin trupulleiki, fólkið dugir enskt.

### Danskt avmarkar menningarførleikan

Í Føroyum verða nógv orka nýtt til at læra danskt. Men danskt kann ikki nýtast til nakað sum helst. Skulu børn og ung koma nakra leið í lívinum, er enskt ein fyritreyt. Danskt verður ikki ein gang nýtt á donskum lærustovnum. Neyvan kemur lækni, búskaparfrøðingur ella annar frøðingur - lógfrøðingar undantiknir - út frá hægri lærustovni, uttan at lærutilfarið er á enskum.

Tað ringasta av øllum er, at vánaligi enski førleikin hevur gjørt, at nærum eingin føroyingur tekur útbúgving uttan fyri danska skúlaverkið. Harvið verða Føroyar fráskornar frá at fáa ein blandaðan altjóða førleika. Eftir stendur ein stórur massi, sum øll hava útbúgving frá sama samfelagsleistinum - lisið somu bók. Hesin sannleiki og veikleiki er sera sjónligur í Føroyum í dag!

### »Happy End«

Sum foreldur er avgerandi at geva børnunum betri møguleikar og førleikar, enn ein sjálvur fekk.

Ongantíð hava vit sum foreldur verið so stolt, sum tá vit vóru til foreldraviðtalu, tá seinasta skúlaárið endaði. Lærararnir kundu allir sum ein greiða frá trimum frálíkum børnum. Eitt var, at tey dugdu sítt fak. Men avgerandi var, at tey øll trý høvdu sosialt medvit og høvdu positiva drívmegi. Okkara børn høvdu eitt gott ástøði - bara ikki í enskum.

Børnini duga øll trý flótandi enskt í dag. Nú, eitt ár aftan á gongur enskt førleikin og málførleikin í familjuni sum heild eftir aldri, Súsanna dugir best, meðan eg dugi ringast!



# Tveir eru kostirnir

**Jógvan Arge**
*býráðslimur í Havn*



Ikki lukkuligt sum tann sjálvútnevndi býarpræsidenturin fekk ilt, nú tann ætlaða glorian um barnaansingina fekk eina skeinu upp undir sannleikans tíma.

Havi ikki sagt annað enn tað, sum Heðin Mortensen sjálvur váttaði í útvarpinum seinasta fríggjakvøld.

Hann segði, at leiðarin á einum barnaansingarstovni fekk tveir kostir í at velja. Antin tók hon fleiri børn inn, enn vanligt hevur verið, ella misti hon tveir petagokar.

Hvørgin kosturin var mjúkur. Báðir gingu út yvir børnini og starvsfólkini, og hon hevur ivaleyst eftir bestu sannføring valt tann minst ringa.

Men eg ivist ikki í, at hon hevur kent seg eins og maðurin, sum á sinni fekk kostirnar: Vilt tú verða hongdur ella skotin?

Úrslitið er tað sama í báðum førum. Børnini á ansingarstovninum fáa ikki somu umsorgan, sum tey higartil hava kunnað fingið.

Kundi ikki funnið upp á at lagt umsitingina undir at hava lagt hetta til rættis.

Ivist onga løtu í, at tað er tann politiska leiðslan, sum stendur aftanfyri við tí endamáli at vilja sleppa at pussa gloriuna skjótari enn gott er.

Framtøk og ábøtur í barnaansingarmálum hevur verið ein felags sak hjá øllum býráðnum hesa setuna. Stendur tað til okkum, verður eisini soleiðis í framtíðini.